UTTAN ÚR HEIMI

## Gátan um SARS kanska loyst

Amerikansku heildumyndugleikarnir halda seg hava funnið eitt virus, sum kann vera orsøkin til ta nógv umrøddu og vandamiklu lungnasjúkuna SARS.

Ein av granskingarstjórunum hjá heilsumyndugleikunum, Julie Gerberding, sigur, at tey hava gjørt stór framstig, men hon leggur kortini afturat, at enn er nakað eftir á mál. Í royndunum at finna upprunan til sjúkuna hava amerikansku granskararnir arbeitt saman við granskarum í fleiri londum. Tað er alheims heilsustovnurin WHO, sum hevur samskipað granskingina, og sambært Julie Gerberding er hetta tað fyrsta samstarvið av sínum slagi.

Mánadagin doyðu fýra fólk av SARS, tvey í Hongkong og tvey í Vietnam, og sostatt hevur sjúkan nú kravt 17 mannalív. Í Japan hava heilsumyndugleikarnir skrásett tveir nýggjar tilburðir, og í Kanada verður hildið, at har hava tólv fólk fingið smittuna. Í Hongkong hava ikki færri enn 260 fólk fingið smittuna, teirra millum ovasti leiðarin í sjúkrahúsverkinum.

## Meiri pengar til kríggið

Í USA hevur George W. Bush, forseti biðið kongressina játta slakar 550 milliardir krónur afturat til útreiðslurnar av krígnum í Irak. Ein embætismaður í Hvítu Húsunum sigur, at pengarnir skulu fíggja væntaðar útreiðslur av krígnum teir næstu seks mánaðarnar.

Møguligar útreiðslur aftan á 30. september eru ikki við í hesari umsóknini, sigur embætismaðurin. Hann sigur, at pengarnir skulu nýtast til at tryggja støðug viðurskifti í Irak og at gjalda tað, sum tað fer at kosta at taka stórar amerikanskar herdeildir aftur úr Irak. Harafturat skal ein partur av pengunum nýtast til at bøta um tilbúgvingina í USA.

Men Bush kann vænta sær mótstøðu í kongressini, tá umsóknin kemur til viðgerðar. Fleiri kongresslimir, eisini úr republikanska flokkinum hjá forsetanum, vísa á, at tað er næstan høpisleyst at nýta so nógvar pengar til kríggj, tá forsetin samstundis hevur lovað amerikanska fólkinum 5.300 milliardir krónur í skattalætta tey næstu tíggju árini. Demokratiskir politikarar hava boðað frá, at teir fara at krevja neyvar útgreiningar av, hvussu pengarnir til hernaðarmál skulu nýtast, áðrenn talan verður um at játta nakað.

## Bin Laden kanska í Pakistan

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, sigur nú, at tað er ikki óhugsandi, at yvirgangsmaðurin Osama bin Laden er í Pakistan.

Fyrr hevur Musharaf altíð avsannað gitingar um, at bin Laden er í Pakistan, men í samrøðu við blaðið The Asian Well Street Journal sigur hann, at tað er ikki óhugsandi, at yvirgangsmaðurin er í Pakistan.

- Hann kann vera flýddur úr Afghanistan um markið higar, sigur Musharaf við blaðið.

## 16 milliónir eftirkomarar

Enskir granskarar, sum hava kannað Y-kromosomið hjá 2.123 asiatiskum monnum, eru komnir eftir, at átta prosent av monnunum høvdu at kalla tey somu Y-kromosomini, og tí halda granskararnir, at teir hava sama ættarfaðir.

Kanningarúrslitið kom óvart á ensku granskararnar, viðgongur Tyler Smith, sum er granskari á lærda háskúlanum í Oxford. Hann sigur, at í veruleikanum merkir úrslitið, at ein og sami maður er ættarfaðir hjá einum av hvørjum 200 monnum í heiminum. Sambært Tyler Smith hevur hesin maðurin livað fyri knappliga túsund árum síðani, og tað er greitt, at hann hevur havt eitt stórt tal av kvinnum. Hetta hevur fingið menn at halda, at talan kanska er um kenda mongolska leiðaran Djenkis Khan, sum herjaði víða í Asia fyri 800 árum síðani.

Tað er væl kent, at Djengis Khan legði hald á tær vakrastu kvinnurnar í teimum londunum, sum hann hersetti, men ensku granskararnir ásanna, at tað kann gerast trupult at prógva, at tann mongolski krígsharrin er upprunin til teir 16 milliónir menninar, sum hava at kalla tey somu Y-kromosomini.

# Óttast kemiskt kríggj um Bagdad



*Irakar við eina amerikanska tyrlu, sum varð skotin niður. Teir báðir amerikansku flogskiparanir vórðu seinni vístir fram í irakska sjónvarpinum*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanarar bera ótta fyri, at Saddam Hussein kann finna uppá at nýta kemisk vápn í bardaganum um Bagdad**

KRÍGGJ Í IRAK

*Árni Joensen*

Amerikansku herdeildirnar standa nú stutt sunnan fyri irakska høvuðsstaðin Bagdad, og amerikansk og iraksk flogfør hava seinastu dagarnar bumbað irakskar verjustøðir við høvuðsstaðin.

Tað hevur leingi verið greitt, at irakska stýrið hevur savnað sínar bestu herdeildir, ta sonevndu tjóðarhirðina, kring Bagdad, og tí hava amerikansku og bretsku herovastirnir ávarað um, at bardagin um býin kann gerast harður. Tað er eisini greitt, at tjóðarhirðin er Saddam Hussein, forseta lýðin, og at hermenninir eru til reiðar at stríðast til seinasta mann.

Men samstundis óttast amerikanararnir fyri, at Saddam Hussein skal finna uppá at nýta kemisk vápn, gerst tað neyðugt. Ónevndar keldur í amerikansku stjórnarumsitingini søgdu í gjár, at irakska stýrið hevur teknað ein reyðan ring rundan um Bagdad. Koma amerikanararnir inn um ringin, fara irakar at nýta kemisk vápn ímóti teimum, søgdu keldurnar.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, sigur, at Saddam Hussein kann fara at nýta kemisk vápn ímóti sínum egna fólki og síðani geva amerikanarum og bretum skyldina. Við bretska sjónvarpið Sky News sigur Powell, amerikanarar hava fingið fatur á upplýsingum, sum benda á, at Saddam Hussein hevur slíkar ætlanir. Eitt nú skal irakski leiðarin hava eina ætlan um at nýta kemisk vápn ímóti irakum har suðuri í Irak.

Í gjár var ein amerikansk herdeild einar 100 kilometrar sunnan fyri Bagdad, samstundis sum ein onnur deild tók seg fram ímóti býnum eystari. Men tess nærri herdeildirnar koma Bagdad, tess harðari er mótstøðan, siga amerikansku heryvirmenninir.

# F..k Saddam. We're taking him out

**Longu fyri einum ári síðani gjørdi George W. Bush, forseti av at koyra Saddam Hussein frá**

KRÍGGJ VIÐ IRAK

*Árni Joensen*

Blaðið Time Magazine skrivar, at longu fyri einum ári síðani var George W. Bush, forseti avgjørdur um, hvat skuldi henda irakska leiðaranum, Saddam Hussein.

- Fuck Saddam. We're taking him out, skal forsetin hava sagt, tá hann ein dagin í mai í fjør stakk høvdið inn um dyrnar á skrivstovuni hjá trygdarráðgeva sínum, Condoleezzu Rice, sum júst sat á fundi við nakrar senatorar og viðgjørdi spurningin, hvørt Irak skuldi avgreiðast í ST, ella um USA skuldi avgreiða málið saman við sínum sameindu í Miðeystri.

Men Bush hevði ongan áhuga í hesum tosinum, skrivar Time Magazine. Ein av fundarluttakarunum hevur greitt frá, at forsetin skúgvaði orðaskiftið frá sær við teimum báðum stuttu setningunum.

Sambært Time Magazine eru tað serliga fýra menn í amerikansku stjórnini, sum standa aftan fyri ætlanina at koyra Saddam Hussein frá. Teir eru Bush, varaforsetin Dick Cheney, uttanríkisráðharrin Colin Powell og varaverjumálaráðharrin Paul Wolfowitz. Sambært blaðnum løgdu Wolfowitz og nakrir aðrir politikarar longu í 1998 eina slíka ætlan fyri táverandi forsetan, Bill Clinton. Cheney tók undir við ætlanini.

- Alt ov leingi hava vit sópað hendan trupulleikan inn undir teppið, segði Cheney við ein ráðgeva fyri tveimum árum síðani, skrivar Time Magazine.

